# Handa álit um koyritekniska breyt



Hósmorgunin fer ein arbeiðsbólkur at handa Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum eitt álit um koyritekniska breyt í Føroyum.

Landsstýriskvinnan hevur sett bólkin at kanna hesi viðurskifti, sum tosað hevur verið um í eitt mannaminni, uttan at nakað ítøkjuligt enn er komið burturúr, og tí bíða helt fleiri í spenningi eftir úrslitinum – og um vit um síðir fáa slíka breyt, at fólk kunnu læra at koyra undir ymsum truplum umstøðum so sum í hálku – bæði av kulda og vatni.

Eisini kunnu fólk her venja seg við, hvussu bilurin uppførir seg undir øllum hugsandi umstøðum – á einum tryggum stað við hollari vegleiðing.



# Kavi og dreingjalótir

Kavi er vanliga nakað, ið eggjar til dreingjalótir av ymsum slag. Og í so máta er einki undantak hesaferð.

Í rundkoyringini við Kollafjørð sóu fólk í morgun hesa standmyndina, ið skjótt má roknast sum gerandisinnslag í kavanum. Í øllum førum er talan um motiv, sum hevur verið at sæð, mest sum hvørja ferð kavi er komin niður seinnu árini.

**-mørk**


